## So vann Henrik Larsen



Í fjórðu royndini eydnaðist tað Køge at vinna dyst í donsku 1. deild. Byrjanin í nýggja kappingarárinum hevur verið stak vánalig, tí Køge tapti fyrstu tríggjar dystirnar. Venjarin hjá Køge, Henrik Larsen, var tó bjartskygdur undan dystinum í gjár, tí leikliga hevur gingið væl hjá Køge. Og nú eydnaðist tað eisini liðnum av Sælandi at vinna ein dyst. Ølstykke var á vitjan, og Køge vann dystin 2-1. Køge legði seg á odda í fyrra hálvleiki, men Ølstykke javnaði í seinna. 20 minuttir fyri tíð skoraði Mads Kjøller Westh sigursmálið hjá Køge.

## AaB heldur fast í toppinum

Danska superligafelagið AaB vann í gjár 2-1 ímóti Randers FC. Hvørgin av føroysku spælarunum hjá AaB spældu við í dystinum, sum varð avgjørdur stutt fyri leiklok. Støðan var 1-1, tá ið brasilski álopsspælarin Caca skoraði sigursmálið átta minuttir fyri leiklok. Sambært heimasíðuni hjá AaB var dysturin uppiborin, men tað skuldi eitt sindur av hepni til seint í dystinum fyri at fáa sigursmálið. AaB liggur nú ovast í superliguni, og tað merkist eisini á áskoðaratalinum til heimadystirnar. 9.496 áskoðarar vóru til dystin á Aalborg Stadion, og tað er tað mesta í hesum kappingarárinum.

# ður ikki avstað

*B36*

*Eb/Streymur*



*B36 reisti seg eftir stóra tapið ímóti KÍ og setti oddaliðið EB/Streym uppá pláss*

*Mynd: Sofus Johannesen*

verjan hevði snorksovið við innkast.

Dysturin bylgjaði báðar vegir, men skuldi ein vinnari finnast, so var tað helst í lagi, at hesin var B36. Málið fingu teir, tá Niels Joensen høgdi eitt flat skot úr 18 metrum, eftir at Sylla nærum hevði driblað eitt B36-álop burtur. Útsýnið hjá René Tórgarð í gestamálinum var helst nakað darvað, og so smoygdi bólturin sær inn um stólparótina.

### Munurin varðveittur

EB/Streymur spendi álopsbogan høgt seinastu løtuna. Egil á Bø varð fluttur fram í gjøgnu, meðan bert tríggir mans vórðu hildnir heima í verjuni. Tað gav eisini nakað av trýsti, uttan at teir stóru møguleikarnir tó vórðu skaptir, og í hinum endanum kundi B36 væl fingið meira burtur úr onkrum av sínum kontra-atsóknum.

Støðan helt sær tó til dystarlok, og so mátti EB/Streymur fyri fyrsta ferð síðani 11. juni fara stigaleyst av vøllinum. Ta ferðina var tað NSÍ, sum steðgaði oddaliðnum, men tað mundi tó koma væl við hjá EB/Streymi, at sama NSÍ hesa ferð dróg svart á heimavølli.

Tað úrslitið bar við sær, at munurin niðureftir framvegis varð varveittur, og við einum sigri mikukvøldi kann EB/Streymur veruliga staðfesta oddastøðuna. Og so vóna teir í felagsliðnum uttan iva, at B36 kann sveiggja seg upp til eitt avrik av sama slag, tá júst NSÍ vitjar í Gundadali mikukvøldið.

B36 fekk í sín lut prógvað, at liðið hóast alt er betri, enn avrikið móti KÍ fyri viku síðani vísti. Hinvegin, so er munurin upp til oddin enn fimm stig, so enn man tað vera ivasamt, hvørt meistararnir skulu roknast upp í oddastríðið. Møguleikan hava teir, men tað fer helst at krevja okkurt um 20 stig í seinastu átta dystunum, um teir á nakran hátt skulu halda fast í teirri vónini.

## Vildu vaska okkum

Hanus Thorleifsson var ikki í iva um, hvør størsta orsøkin til góða B36-avrikið sunnudagin var.

– Vit vóru sera uppsettir. Vit vildu allir sum ein vaska hatta avrikið móti KÍ av okkum, og tað haldi eg, at vit megnaðu.

*Nú hevur verið nógv tosað um, hvørji lið eru inni ella úti í endaspurtinum. Er B36 enn við í gulldystinum?*

– Tað vilja vit í øllum førum vera, men tað verður sera trupult. Bæði tí tað eru fimm stig upp, og tí skráin hjá EB/Streymi sær at kalla yvirkomulig út. Tað einasta, sum vit kunnu gera, er at vinna okkara. Og so annars bara vóna tað besta, helt Hanus.

## Vóru hart trýstir

Við bara einum stigi í teimum báðum seinastu dystunum, er kanska onkur, sum fær tað fatan, at EB/Streymur er um at fáa tiltiknu gummibeinini, nú avgerandi fasan í landskappingini stendur fyri framman. Ein pástandur, sum liðskiparin hjá oddaliðnum tó als ikki er samdur í.

– Tað haldi eg als ikki. Vit hava verið fýra ferðir í Gundadali í ár, og hetta er so fyrsta ferðin, at vit fara av vøllinum uttan stig. Sjálvandi vildu vit fegnir havt stig her, men tað er eingin vanlukka at tapa ein slíkan dyst.

— Vit vóru eisini sera hart kroystir fyri steðgin, og vit høvdu ilt við at fáa okkara ketur at hanga saman , so tað var kanska uppiborið, at B36 fór við sigrinum, helt Egil á Bø.

*Men munurin niður eftir vaks tó ikki. Tit mugu væl viðganga, at tað framvegis sær ljóst út?*

– Sjálvandi hóskaði tað okkum væl, at NSÍ tapti. Men tað ber ikki til, um vit alla tíðina missa stig. Nú skulu vit helst hava fult móti bæði ÍF og NSÍ á heimavølli. Tað er í sjálvum sær ríkiliga stór uppgáva, og tí taka vit bara ein dyst í senn, helt Egil.